# Guðrun!



nógvar stillar sangir. Hon heldur seg hava ment seg hagar, og at hon hevur hug til tess. Samstundis sigur hon, at hon hevur sett sær sum mál eisini at skriva tónleik sjálv. Men her setur hon sær stór krøv. Hon vil bera ein boðskap við teksti, sum skal verða persónliga frá henni og við hennara kenslum, og tí vil hon eisini hava ávirkan á, hvussu løgini verða spæld. Hon metir sjálv, at hetta er næsta stigið, sum takast skal.

Eisini sigur Guðrun, at tað er stóribeiggi sín Eyðun, sum hevur givið henni tónleikin. Sum nevnt aðrastaðni fór hon inn á kamarið hjá honum at lurta og at syngja saman við honum tá hon var lítil. Hetta var eftir villari tónleiki enn tí, hon nú vanliga syngur, og er tað kanska haðani hugurin er at syngja tónleik við meiri futti í. Hon sigur, at hon tá vildi duga at syngja tað sama sum hann.

Nú byrjar so henna parturin aftur, at ferðast runt og syngja, bæði í Danmark og í Føroyum.

*Tann eini viðmerkjandi dómarin var so fegin um framførsluna hjá Guðruni, at hann broytti kendu orðini hjá Kennedy at vera "Ich Bin ein Færing"*

# *Onnur um Guðrun*

## Beiggin Eyðun
## Inn á kamarið at syngja

Eyðun, beiggi Guðruna greiðir frá, at Guðrun, tað hann minnist, altíð hevur verið áhugað í tónleiki, eins og hann sjálvur. Tá hann lurtaði og sang afturvið tónleiki inni á kamarinum, kom hon altíð inn og skuldi syngja tað sama sum hann. Tá hevur hon verið um eini 7-8 ára gomul. Hetta var tónleikur sum t.d. hjá Queen, Uriah Heep og Deep Purple.

Hon fór frá tónleikastílinum hjá beiggjanum, tá Alanis Morrisette í 1995 bergtók heimin við útgávuni Jagged Little Pill, har vit kanska serliga minnast lagið Ironic. Eyðun hevði lænt hesa fløguna frá einum vini, men hann slapp aldri at lurta, tí Guðrun tók hana til sín og gavst at ganga inn á kamarið hjá beiggjanum at lurta og syngja. Hon fór inn á sítt egna kamar at lurta og upp á stutta tíð hevði hon ikki bara lært seg at syngja løgini og orðini, men hon sang alla plátuna, sum Alanis Morrissette gjørdi. Tí heldur beiggin, at Alanis hevur verið tann avgerðandi ávirkanin á tónleika-ansni Guðrunar. Hon minnist eisini enn fleiri av sangunum, tey plagdu at syngja saman, tá hon var yngri, og tað hendir seg meiri enn so, at tey jamma eitt Deep Purple lag.

Tey bæði eru tætt knýtt at hvør øðrum, tí tey eru jú bara tvey systkin. Eyðun sigur at tey, sum systkin flest, sum yngri eisini hava argað hvønn annan. Hann heldur, at lítlasysturin er eitt fantastiskt menniskja.. Henni dámar ikki væl at verða rættað og vil helst greiða tingini sjálv, og at tað uttan iva er tónleikurin sum dregur. Tað er her hon nýtir orkuna og hon veit hvat hon vil. Annars sigur hann um systrina, at hon er ikki broytt av at gerast eitt kent anlit. Sjálvandi mennist hon, men tað er jú eisini ein náttúrligur partur av at gerast eldri.

## Umboðsstjórin (Managarin)

Umboðsmaður Guðrunar, John Christoffersen, sigur um hana, at hon sum menniskja er løtt at arbeiða við og at vera saman við, tí hon hevur jú bæði beinini á jørðini. Men hon kemur altíð ein hálvan tíma ov seint. Tá hann sigur klokkutíðir fyri uppmøting, má hann lúgva tey ein hálvan tíma fyrr, fyri at fáa hana at møta røttu tíðina. Sum øll onnur vísir hann á, at Guðrun hevur eina fantastiska rødd, og at hon tónlistarliga ikki enn er komin heilt á mál. Flestu løgini á hennara útgávum eru friðarlig men hon hóskar eisini væl til rokk og villari tónleik, og hon dugir hetta væl. Hetta kann gera, at hon á pallinum letur seg meiri upp. Men, sigur hann, Guðrun skal ikki broyta seg, tí hon syngur so einastandi væl, røddin er eitt fantastiskt viðfødd gáva.. Fólk elska hana fyri hetta Guðrun skal tó sjálv útvega sær meiri tilfar, sum antin hon sjálv ger, og tað ætlar hon, ella sum onnur gera fyri hana. Tað er neyðugt fyri at koma áfram, haðani hon longu er komin. Hon hevur prógvað, at dugur er í henni, og tí skal hon tora at seta sær hægri mál, m.a við egnum tónleiki. Men hvat verður við á fløgum, verður ikki bert hennara avgerð, tí har eigur útgávufelagið eisini nógv av avgerðini.

## Sanne Salomonsen

Sanne Salemonsen, sum eisini hevði framførslu hetta kvøldið, er ein av fyrimyndum Guðrunar. Eg spurdi hana, hvat hon helt um Guðruna. Hon segði seg hava lagt til merkis Guðruna, serliga tí at hon hevur hesa einastandandi røddina, men eisini tí at tær báðar hava sungið á somu tónleikatiltøkum. Hon segði, at tað Guðruni nú tørvar, er góða og rætta ráðgeving. Hon segði eisini, at hon sjálv ætlar at geva Guðruni góð ráð, um hvussu hon heldur, at Guðrun kann gera, til tess at koma enn longri í tónleikalívinum. Men legði afturat, at Guðrun er tann av luttakarunum í stjørnukappingunum, sum hon hevur havt mest samband við.